# Shell endurskoðar støðu sína í Føroyum

OLJULEITING Á ATLANTSMÓTI

*Jan Müller*




*Kortið vísir útbjóðaðu økini (guli liturin). Loyvini, sum eru latin, liggur øll tætt upp at føroyska økinum og eru í hesum teigum: 176/20 Amerada Hess, BG,Dong. 176/25 Phillips, Statoil, Veba. 204/9 og 204/10 Amerada Hess, Texaco, Dong, OMV. 204/16 Amerada Hess, BG, Dong. 204/17 Texaco, Conoco, EDC. 204/18 BP, Shell. 204/21 Amerada Hess, BG, Dong. 213/5 og 214/1 Texaco, Intrepid Enegy. 213/26 og 213/27 Texaco. Viðmerkjast kann, at í onkrum føri sum t.d. í loyvinum hjá Amerada Hess í bæði føroyskum (6005/20) og bretskum øki (176/20) verður mett, at møguligt oljufelt liggur báðumegin markið.*

Líkt er til at eitt av heimsins størstu oljufeløgum, Shell, er á veg inn aftur í føroyskan sjógv. Lynda Armstrong, sum tók við sum menningarstjóri (Business Development Director) hjá Shell í Bretlandi í fjør nakað um sama mundið sum Shell fór undir at endurskoða sínar framtíðar ætlanir á Atlantsmótinum tvs. øllum økinum millum Føroyar og Hetland, sigur, at Shell í eina tíð hevur arbeitt við at endurskoða støðu sína til hetta økið. Tá latið varð upp fyri 19. útbjóðingini í bretskum øki metti leiðslan í Shell, at tað var rætt at taka av hesum møguleikanum. So tey samdust við BP um at søkja um teigin 204/18, sum tey hava fingið tillutað.

– Vit eru sera glað fyri at hava fingið eitt nýtt leitiloyvi saman við BP á Atlantsmótinum vestan fyri Hetland. Í løtuni eru tey við at endurskoða metingar sínar av øllum økinum og hava enn ikki tikið endaliga støðu til, um tey skulu fara innaftur í hetta økið við fullari megi. Tann avgerðin verður tikin innan nakrar fáar mánaðir.

Uppá fyrispurning í hvønn mun hesar endurskoðaðu metingarnar hjá Shell eisini fevna um føroyska økið, har loyvi longu eru latin, sigur Lynda Armstrong, at av tí at Føroyaøkið er partur av sama jarðfrøðiliga bassenginum sum økini vestan fyri Hetland, so fevna teirra metingar eisini um føroyska landgrunnin.



*Lynda Armstrong, stjóri í Shell, sum í framtíðini fer at umsita virksemi felagsins á Atlantsmótinum (økinum millum Føroyar og Hetland).*

– Økið er sjálvandi meira áhugavert nú enn fyri tveimum árum síðani, tá oljuprísurin var niðri á 10 dollarunum fyri tunnuna. Vísir tað seg, at tað er rætt og skilagott aftur at brúka pengar og orku til leiting og útbygging á Atlantsmótinum, vil tað vera millum framtíðar møguleikarnar, sum leiðslan í Shell skal taka støðu til. Shell arbeiðir rættiliga víða um og skal fyritøkan til at avgera, at hon skal brúka munandi upphæddir á Atlantsmótinum, so er eisini neyðugt, at økið er attraktivt.

Lynda Armstrong og Shell leiðslan sum heild fylgja væl við, hvat eitt nú BP fyritekur sær á føroyska landgrunninum.

– Vit eru greið yvir, at BP ætlar sær at bora í august, og skulu vit vera við í tí arbeiðinum, so skulu vit til at taka eina støðu væl áðrenn tað, og tað er so hetta vit royna at finna út av í løtuni. Svarið kunnu vit geva innan ein til tveir mánaðir. Tað skal takast av ovastu leiðsluni í Shell, sum er hon, ið ger av, hvar í heiminum fyritøkan skal gera framtíðar íløgur í bæði leiting og framleiðslu.

Lynda Armstrong ásannar, at føroyaøkið og annnars alt Atlantsmótið eru ein spennandi nýggj oljuprovins. Hon heldur, at úrslitið av 19. útbjóðingini í bretskum øki er gott fyri allar partar. Tað vísir eisini, at tað er stórur áhugi fyri økinum og heldur hon, at bæði oljufeløg og myndugleikar eru nøgdir við úrslitið.

## Steðgur

Tað var fyri tveimum árum síðani, at Shell avgjrødi meira ella minni at taka seg úr øllum økinum millum Føroyar og Hetland. Lynda Armstrong velur at kalla hetta ein steðg. Shell hevði tá so nógvar aðrar møguleikar at velja millum, at Atlantsmótið varð lagt á hyllina. Eisini av teirri orsøk, at tað var so kostnaðarmikið at útvikla oljufelt her.

Nú er nógv broytt. Shell hevur fingið drúgvar royndir og ment sín tøkniliga førleika at arbeiða á djúpum vatni í Mexikanska flógvanum. Út frá teirra royndum aðrastaðni í verðini ber til at lækka kostnaðin av at útbyggja felt sum Foinaven munandi. Lynda Armstrong dylur heldur ikki fyri, at BP og Shell høvdu kunnað verið eitt gott team á Atlantsmótinum, tí BP hevur eisini drúgvar royndir á djúpum vatni. Feløgini arbeiða eisini saman á djúpum vatni nógva aðrastaðni í heiminum.

Herfyri segði Eyðun Elttør, landsstýrismaður, at Shell er vælkomið aftur í føroyskt øki. Tað gleðir Lyndu Armstrong og leggur hon aftrat, at so skjótt tey hava tikið eina avgerð, fer hon at seta seg í samband við føroyskar myndugleikar. – Vit eru greið yvir, nær BP ætlar sær at bora í Svínoyarprosepktinum, og tað er tí greitt, at vit mugu koma til eina avgerð áðrenn tað.

## Dong væl nøgt

Hjá danska oljufelagnum Dong eru tey sera væl nøgd við úrslitið av 19. útbjóðingini í Bretlandi. Søren Gath Hansen, stjóri sigur, at Dong við hesi útbjóðingini hevur fingið fótin fastan á Atlantsmótinum. Dong er við í fýra loyvum, sum Amerada Hess er operatørur í. Sosialurin skrivaði í farnu viku, at Dong varð vorðið operatørur í einum loyvi. Tað er ikki rætt. Søren Gath Hansen sigur, at við at hava fingið tillutað fýra av nýggju loyvunum vestan fyri Hetland hevur Hessbólkurin prógvað, at hann stendur fyri tøkniligum arbeiði á sera høgum støði. –Dong er nú við bæði á føroyskum og bretskum øki, og tað eru vit fegnir um. Við hesum hava vit styrkt munandi um støðu okkara á Atlantsmótinum.

